

# GIGNI - heilsufrøði til børn og ung

www.gigni.fo

GIGNI

# Hvør er GIGNI ?

Gigni er ein landsstovnur, ið skal veita heilsufrøðiliga tænastu, ætlað øllum barnafamiljum, skúlabørnum og tannáringum í Føroyum.

**Endamálið hjá Gigni er:**

- At fremja heilsu
- At fyribyrgja sjúku
- At styrkja og menna foreldraførleikan
- At møguligir trivnaðar- og menningartrupulleikar verða avdúkaðir og viðgjørdir sum skjótast

**Gigni virkar fyri:**

- At børn fáa eina jaliga og mennandi lívsbyrjan
- At børn og ung fáa heilsumennandi barna- og ungdómsár
- At økja tilvitanina um leiklutin at vera foreldur

> **"Gigni skal vegleiða og stuðla likamligu, mentalu og sosialu heilsuni hjá børnum og ungum, styrkja og menna foreldraførleikar**



# Kom í samband við okkum og tín heilsufrøðing

Verður barnið føtt í Føroyum, fáa vit føðifráboðan sendandi frá ljósmóður eftir føðingina. Somuleiðis fáa vit útskrivingarblað sendandi frá føðideildini, umframt, um tað verður mett neyðugt, boð umvegis telefon frá føðideildini, tá tit verða útskrivað og fara heim.

**Eftir hetta setir avvarðandi heilsufrøðingur seg í samband við tykkum, og bjóðar tykkum heimavitjanir.**

Eru tað viðurskiftir sum gera, at barnið verður sent til Ríkissjúkrahúsið ella annað sjúkrahús eftir føðing, er sera umráðandi, at tit siga okkum frá, tá tit eru á veg aftur til Føroyar, so vit kunnu veita tykkum tænastu skjótast tilber.

Verður barn føtt í Danmark, verður ongin føðifráboðan send til Gigni. Tí er neyðugt, at tit sjálvi seta tykkum í samband við okkum, so tit kunnu fáa vitjan av heilsufrøðingi, tá tit eru heima aftur.

Familjur, ið flyta til landið í styttri ella longri tíðarskeið, eru eisini umfataðar av skipanini, og eru vælkomnar at seta seg í samband við Gigni.



Setið tykkum í samband við okkum á **tel 61 40 00** ella á **gigni@gigni.fo**

# Hvat er ein heilsufrøðingur?

Ein heilsufrøðingur hevur nomið serútbúgving innan:

- likamliga, sálarliga og sosiala heilsu og menning hjá børnum og ungum
- tilknýti og foreldraførleika
- heilsufremjan og fyribyrging

Fyri serútbúgving er ástøðiliga kravið, at viðkomandi skal vera sjúkrarøktarfrøðingur, við hollum royndum innan pædiatri.

**Gigni - Heilsufrøði til børn & ung er í stuttum:**
**Fólkaheilsa til børn og ung**

**Meiri kunning um okkum á www.gigni.fo**

> GIGNI virkar fyri, at børn fáa eina jaliga og mennandi lívsbyrjan og heilsugóð barna- og ungdómsár!

GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 • Postboks 132 • 110 Tórshavn • gigini@gigni.fo • **Tlf. 61 40 00**